## TIM – Emmeloord, Holland

**Aldur:** 15-18 ár.
**Nær:** 4. – 12. august 2010.
**Prísur**: 1400 kr. (ferðing ikki íroknað).

*Á TiM í Hollandi kanst tú millum annað uppliva hetta:*

- Outreach Emmeloord Summermarket: tónleikur, stuttleiki, drama,talkzone, andlitsmáling, ballón myndan.
- Outreach Urk: uppliv samfelagið í einum gomlum hollendskum fiskibýi, ið er fyltur við brotnum tannáringahjørtum. Verð við til at veita teimum vón, gleði og vinarlag.
- AZC Luttelgeest: Vitja eitt asylsentur og lær um fólk, sum fóru frá sínum heimlandi og nú liva í ótryggleika og einsemi, og hvørja ávirkan tað hevur havt á lív teirra.

## TIM – Southhampton, Ongland

**Aldur:** 16-18 ár.
**Nær:** 4. – 14. august 2010.
**Prísur**: 1200 kr. (ferðing ikki íroknað).

Tú fert at vera saman við ungdómum frá nógvum ymiskum londum. Saman fáa tit kunning og venjing, so tit betur kunnu deila tykkara trúgv við onnur. Síðani fara tit at røkka út til børn, ung og teirra familjur. Flestu dagarnar verður eisini NET-tíð, har tit møtast í smáum bólkum at tosa saman, deila við hvørjum øðrum og biðja saman.

Tú kemur at arbeiða í eini samfelagsverkætlan, sum longu er á staðnum, har tú verður við til at styrkja um sambondini, sum longu eru sprottin ígjøgnum fleiri ár. Arbeitt verður saman við einum hjálparbólki í einum illa støddum øki. Hvønn dag í eina heila viku bjóða vit stuttlig tiltøk til børnini, tey ungu og teirra familjur. Har verður bæði "kids club", andlitsmáling, hárflætting, neglamáling, hoppiborgir, ítróttur, spøl, drama, dansur, grilling og nógv annað stuttligt. Tannáringar fáa møguleikan at hjálpa til við øllum teimum ymisku tiltøkunum umframt at knýta vinarbond við tey ungu í økinum.




## *TiM – Teens in mission.*

TiM bjóðar tannáringum lívsbroytandi missións upplivingar. Liðini verða vand og útstýrd til at endurspegla Jesus Kristus ígjøgnum orð og gerðir. Tú fert at vaksa í trúgv, samstundis sum tú fatar og tekur fram tínar gávur og vinnur tær royndir, sum tú kanst brúka, tá tú kemur heim aftur.

TeenStreet Føroyar gevur tær í ár møguleikan at velja ímillum hesi 4 TiM:

1. TiM í Skovlunde, Danmark
2. TiM í Emmeloord, Holland
3. TiM í Southampton, Ongland
4. TiM í Halle, Týskland

*Tørvar tær fleiri upplýsingar, enn tú finnur í hesum faldara, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum:*

*Ruth (519090 ruth@teenstreet.fo), Anita (597842 anita@tennstreet.fo),*

**www.teenstreet.fo**

## TIM – Skovlunde, Danmark - Útbreiða kærleika Guds

**Aldur:** 16-18 ár (avmarkað pláss).
**Nær:** 4. – 10. august 2010.
**Stað:** Skovlunde Frikirke.
**Prísur**: 800 kr. (ferðing ikki íroknað).

**Skovlunde** er ein partur av Stórkeypmannahavn – ca. 15 km. frá centrum. Skovlunde Frikirke er ein nýggj lokal samkoma, hvørs endamál er at úbreiða kærleika Guds soleiðis, at onnur eisini verða eggjaði til, saman við okkum, at tilbiðja Gud.
Les eisini: http://www.skovlundefrikirke.dk/

Vit hava havt fleiri tiltøk fyri at gera samkomuna kenda her í nærumhvørvinum. Okkum tørvar tína hjálp til at halda á í hesum arbeiði, serliga við atlitið til at fáa samband við børn og ung. Tað er tí ein treyt, at tú dugir at tosa danskt, um tú ætlar tær á TIM í Skovlunde, har vit vera umleið 40 tannáringar umframt leiðarar og liðleiðarar.

Vit ætla m.a. at hava hesi tiltøk fyri børnum:

- Dukkusjónleik
- Hárflætting
- Andlitsmáling
- Tónleik
- Dans/Drama
- Hoppipútu
- Ítrótt og ymisk spøl

Fyri tey ungu kundu vit hugsað okkum at havt eitt ungdóms kafékvøld, hvar tú fært møguleikan at deila tína trúgv og tín vitnisburð við onnur ung m.a. við drama, sangi ella tónleiki ella við at fortelja, hvat tú sjálv/ur hevur upplivað saman við Gudi.

Tað verður eisini ein frídagur, har vit hugna okkum saman og uppliva okkurt spennandi í Keypmannahavn.

Hví ikki seta tíð av í summar til at útbreiða kærleika Guds til íbúgvarnar í Skovlunde?

## TIM – Halle, Týskland - Lutað tína trúgv við onnur

**Aldur:** 15-17 ár.
**Nær:** 4. – 11. august 2010.
**Hvar:** Halle (Saale) Samkoma: Evangeliumsgemeinde.
**Prísur**: 900 kr. (ferðing ikki íroknað).

**Halle** er ein býur við nógvum møguleikum og nógvum avbjóðingum, men býurin er eisini kendur fyri, at tað eru sera fá játtandi trúgvandi. Vit hava brúk fyri tínum vitnisburði. Kom og verð ein, sum skapar vón millum tey ungu í Halle saman við okkum!

Tú hevur gávur og evnir, sum tú kanst brúka til æru fyri Harran. Verið tað nú í tónleiki, ítrótti ella kanska tú ert ein vinarligur persónur, ið dugir væl at lurta. Kanska tú ert ein bønarhermaður. Kanska hevur tú aðrar handaligar gávur og kanst hjálpa okkum í samband við umbyggingina av okkara ungdóms-Café, ella tú kanska elskar at vera saman við børnum. Men tað kann jú eisini vera so, at tú als ikki veitst, hvørjar gávur tú hevur!
Kom til Halle, so finna vit útav tí.

**Hvørjir "Outreach" møguleikar eru so?**

- Tú kanst spæla ymiskan tónleik og syngja
- Ítróttur / spøl í eini park
- Barnatiltøk: Andlitsmáling, gera djór o.a. úr luftballónum og ymiskt annað.
- Tiltøk á ellisheimum, hvar tú kanst vera saman við einum øðrum ættarliði.
- Handaligt arbeiði í LichtHaus (ungdómshús)
- Kreativ gøtu-missión

Tú fært eisini ein frídag, hvar tú kanst hyggja teg um í Halle. Har eru nógvir handlar av ymiskum sløgum. Tú kanst eisini njóta ta vøkru náttúruna, við at fara ein túr í kano ella bara slappa av, hyggja teg um og njóta tilveruna.